

*Elisabeth Westenholz spælir á klaver í Lærarskúlahøllini til heiðurs fyri Eivindi Mohr, listamanni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Konsertfelagið skipar fyri tónleikatiltøkum

**Leygarkvøldið skipaði felagið fyri heiðurskonsert fyri Eivindi Mohr, listamanni, sum doyði fyrr í ár**

TÓNLEIKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Konsertfelagið er nú farið undir virksárið 2005/ 2006.

Fyrsta tiltakið hjá felagnum er vitjanin av Elisabeth Westenholz og Toke Lund Christiansen, sum bæði eru danir og leika ávikavist á klaver og floytu.

Leygarkvøldið skipaði Konsertfelagið fyri væleydnaðari heiðurskonsert fyri Eivindi Mohr, listamanni, har Elisabeth og Toke syrgdu fyri tónleikinum.

Við løtuna greiddi Elisabeth, sum kendi Eivind persónliga, frá manninum, hon ynskti at heiðra, og eftir konsertina hittust fólk í móttøkuhúsunum hjá Tórshavnar kommunu.

### Masterskeið

Í sambandi við donsku vitjanina, hevur eisini verið skipað fyri sonevndum masterskeiðum fyri næmingum, og seinnapartin sunnudagin var konsert í Lærarskúlahøllini við næmingum, sum hava verið á hesum skeiðum.

Í kvøld, mikukvøldið, verða Elisabeth og Toke aftur at hoyra í Lærarskúlahøllini, og hendan konsertin byrjar klokkan 19.30.

# Lítil yngul er á landgrunninum

**Skulu vit taka yngulkanningarnar, sum Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt í summar, sum barometur fyri gongdini í fiskastovnunum komandi árini, stendur barometrið lágt í løtuni. Men náttúran plagar at duga at hátta sær sum best, tá ið ástendur**

YNGUL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Yngulkanningarnar, sum Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt í summar, eru ikki serliga positivar.

Tilsamans 28 ymisk sløg av fiskayngli vórðu fingin undir kanningunum, harav 25 á landgrunninum og 18 á Føroyabanka. Yvirhøvur var lítið av øllum sløgum at síggja.

Vanliga hevur nógv mest verið at fingið av hvítingsbróðuri, og soleiðis var eisini í summar, men nøgdin var ógvuliga lítil.

Nøgdirnar av nebbasild vóru eisini ógvuliga smáar, og bert einaferð áður síðan 1974, hava tær verið eins smáar og í summar.

Har frægastu nøgdirnar av nebbasild vórðu fingnar, var eisini nakað av svartfugli at síggja.

Fiskirannsóknarstovan sá eisini svartfugl í Suðuroyarfirði, men har var næstan einki yngul.

Yngulnøgdirnar av hýsu og toski vóru heldur einki at reypa av á kanningarferðini, og vit skulu heilt aftur til tey vánaligu árini í 90-unum fyri at síggja líka smá tøl, sum tey, ið vórðu staðfest hesaferð.

Somuleiðis var bert hendinga sild og lodna fingin.

Kanningarnar á Føroyabanka vístu, at lítið av toskayngli var at síggja. Nøgdirnar av hýsuyngli vóru á eini leið, tó væl minni enn metárið í fjør.

Á Føroyabanka var lítil og eingin nebbasild.

Í mun til í fjør, var miðallongdin av øllum yngli minni í ár.



*Sambært yngulkanningunum verður ikki so nógv upp í "posan" hjá teimum sum fiska*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# "Kunnu" kóka vatn úr byrgingini í Havnardali

VATN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fráboðan í síðstu viku, ger Tórshavnar kommuna vart við, at borgarar, sum fáa vatn úr vatngoymsluni í Havnardali, "kunnu" kóka vatnið, meðan lýtt er í veðrinum.

- Dálkingin er ikki stór, og fyri frísk fólk er tað ikki vandamikið at drekka vatnið, sigur kommunan.

Á einum korti verður víst á, hvørjir býarpartar í Havn fáa vatn úr vatngoymsluni í Havnardali, og her er talan í fyrsta lagi um vesturbýin og miðbýin.

Í fráboðanini verður sagt, at tað eru nýggju kanningarhættirnir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sum vísa, at vatndygdin ikki er nøktandi til framleiðsluna á virkinum hjá Fiskavirking í Havn, sum hevur fingið vatn úr Havnardali.

Dánial K. Christiansen á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni segði herfyri við Sosialin, at fleiri koliforma-bakteriur eru í vatninum úr Havnardali, enn kunngerðin hjá landsstýrinum hesum viðvíkjandi ásetir.

Koliforma-bakteriur stava serliga frá skarni, og Dánial K. Christiansen helt, at betur er at vera fyrivarin.

# Mús goymir "lykilin" til eitt longri lív

**Granskarar leggja dent á, at nógv ár fara at ganga, áðrenn sigast kann við vissu, um royndirnar við mýsnum kunnu "flytast" yvir á menniskju**

HEILSA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hvør hevði væntað, at ein lítil mús kann goyma loyndarmálið um aldurdómin?

Ein kanning vísir nú, at eitt serstakt hormon, sum granskarar hava funnið í eini mús, kann leingja um lívið hjá músini við 30%.

Granskarar vóna, at kanningin eisini kann nýtast til menniskju og soleiðis halda aftur sjúkum, sum standast av elli.

Hormonið, sum talan er um, er vanligt í súgdjórum – og eisini í menniskjum og kann sambært granskarum leingja um lívið.

- Nýggja vitanin fyllur út "holini" í tí putlispæli, sum er loyndarmálið aftanfyri aldurdómin, sigur amerikumaðurin, L. Stephen Coles, sum starvast á UCLA School of Medicine, við Washington Post.

Kanningin tekur útgangsstøðið í eini granskingarætlan, sum varð sett á kjøl í 1997, har granskarin, Makoto Kuro, staðfesti sonevnda hormonið, "klotho-gen", í mús. Kuro kom eftir, at tá ið hetta hormonið verður oyðilagt, eldist músin skjótari og doyr fyrri.

Í nýggju kanningini vendi Makoto Kuru stutt sagt mannagongdini á "høvdið". Við at geva mýsnum fleiri klotho-gen, gjørdust tær nú 20-30% eldri.

Granskarar leggja dent á, at nógv ár fara at ganga, áðrenn sigast kann við vissu, um royndirnar við mýsnum kunnu "flytast" yvir á menniskju.

Roknast kann tó ikki við, at æviga lívið er í ljósmála. Í fyrsta lagi vóna granskarar, at ílegan kann nýtast í stríðnum móti sjúkum, sum standast av ellini.

- Men hetta er eitt stig á leiðini fram ímóti einum betri aldurdómi – og einum longri lívi, sigur Anna Mc Cormick, sum starvast á The National Institute of Aging, við Washington Post.



*Nýggja vitanin fyllur út "holini" í tí putlispæli, sum er loyndarmálið aftanfyri aldurdómin*